# Kunngerðablaðið A

2025

Givið út 12. juni 2025

Nr. 109

11. juni 2025


**Kunngerð**
**um**
**sálarligt arbeiðsumhvørvi**

Við heimild í § 10, § 35, stk. 1, § 37, stk. 1 og § 66 í løgtingslóg nr. 70 frá 11. mai 2000 um arbeiðsumhvørvi, verður ásett:

## Kapittul 1
## Virkisøki

**§ 1.** Kunngerðin fevnir um sálarligt arbeiðsumhvørvi.

**§ 2.** Kunngerðin er galdandi fyri alt arbeiði, sum verður útint fyri ein arbeiðsgevara.

**§ 3.** Hóast ásetingina í § 2 eru §§ 5-11, 25 og 31-36 galdandi í sambandi við handfaring av vandanum fyri arbeiðstongdum harðskapi uttan fyri arbeiðstíð.

**§ 4.** Skyldan sambært hesi kunngerð liggur á arbeiðsgevarum, arbeiðsleiðarum og arbeiðsfólki samsvarandi ásetingunum í kapitli 3 í løgtingslógini.

## Kapittul 2
## Almennar ásetingar

**§ 5.** Arbeiðið skal í øllum liðum verða lagt til rættis, skipað og útint soleiðis, at ávirkanirnar í sálarliga arbeiðsumhvørvinum, bæði út frá einari einstakari og einari samlaðari meting, eru trygdarliga og heilsuliga fult forsvarligar.

**§ 6.** Fyribyrgjandi tiltøk skulu setast í verk sambært teimum almennu meginreglunum um fyribyrging, sambært skjali 1.

**§ 7.** Við ávirkanir í sálarliga arbeiðsumhvørvinum eru sambært hesi kunngerð at skilja sálarligar ávirkanir í arbeiðinum, sum stava frá:
1) Háttinum sum arbeiðið er lagt til rættis og skipað á.
2) Skipanarligum viðurskiftum, sum hava týdning fyri arbeiðið hjá starvsfólkunum.
3) Innihaldinum í arbeiðinum, herundir krøvunum í arbeiðinum.
4) Háttinum, sum arbeiðið verður útint á.
5) Menniskjaligu sambondunum í arbeiðinum.

**§ 8.** Tá ið arbeiði verður útint, skal fyrilit havast fyri aldri, kunnleika, arbeiðsevni og øðrum fortreytum hjá starvsfólkinum.

*Stk. 2.* Starvsfólk, sum eru í serliga viðkvomum vandabólkum, skulu verða vard móti vandum í sálarliga arbeiðsumhvørvinum, sum fyri tey eru serliga álvarsamir.

**§ 9.** Um arbeiðsgevarin ikki hevur neyðugu fakligu vitanina at taka sær av trygdararbeiðinum og heilsuarbeiðinum við sálarliga arbeiðsumhvørvinum á arbeiðsplássinum, skal arbeiðsgevarin fáa uttanhýsis fakliga hjálp við tí endamáli at tryggja, at sálarliga arbeiðsumhvørvið hjá starvsfólkunum altíð er fult forsvarligt.

**§ 10.** Arbeiðsgevarin skal tryggja, at hvørt einstakt starvsfólk, uttan mun til slag og longd av setanini, fær neyðuga og málrættaða upplæring og leiðbeining í at útinna sítt arbeiði á ein vandaleysan hátt. Upplæring og leiðbeining skal fara fram í sambandi við:
1) Starvssetanina.
2) Flyting ella broyting av arbeiðsuppgávunum.
3) Innføring ella broyting av arbeiðsútgerð.
4) Innføring av nýggjari tøkni.

*Stk. 2.* Tann í stk. 1 nevnda upplæring og leiðbeining skal tillagast til menningina í arbeiðinum, herímillum um nýggir vandar taka seg upp í sálarliga arbeiðsumhvørvinum. Upplæringin og vegleiðingin skal, um neyðugt, endurtakast regluliga.

*Stk. 3.* Arbeiðsgevarin skal kunna starvsfólkini um vanlukkuvandar og sjúkuvandar, sum kunnu verða knýttir at teirra arbeiði.

**§ 11.** Arbeiðsgevarin skal syrgja fyri, at virkið eftirlit er við, at arbeiðið verður útint trygdarliga og heilsuliga fult forsvarligt.

*Stk. 2.* Arbeiðsgevarin skal tryggja, at fullgóðar vegleiðingar og mannagongdir eru fyri, hvussu brot

á hesa kunngerð kunnu fráboðast innanhýsis av starvsfólki.

*Stk. 3.* Arbeiðsgevarin skal tryggja, at greiðar mannagongdir eru fyri, at fráboðanir frá starvsfólki sambært stk. 2 fáa neyðuga viðgerð.

**§ 12.** Arbeiðsstaðið skal vera innrættað trygdarliga og heilsuliga fult forsvarligt út frá eini meting av teimum umstøðum, sum kunnu hava ávirkan á sálarliga arbeiðsumhvørvið, ella sum kunnu hava ávirkan á likamliga ella sálarliga heilsu upp á stutta ella langa tíð. Um tað við arbeiði, sum er umfatað av kunngerð um innrætting av skiftandi arbeiðsplássum, ikki er møguligt ella rímiligt at broyta innrættingina av arbeiðsstaðnum, skulu onnur tiltøk verða sett í verk, soleiðis at arbeiðið kann verða útint á fult forsvarligan hátt.

## Kapittul 3
## Serligar ásetingar um einstakar ávirkanir í sálarliga arbeiðsumhvørvinum

*Stór arbeiðsbyrða og tíðartrýst*

**§ 13.** Arbeiðið skal í øllum liðum verða lagt til rættis, skipað og útint soleiðis, at tað er trygdarliga og heilsuliga fult forsvarligt bæði yvir styttri og longri tíð, við atliti at stórari arbeiðsbyrðu og tíðartrýsti.

**§ 14.** Stór arbeiðsbyrða og tíðartrýst er, tá ið ójavnvág er millum arbeiðið, sum skal útinnast, og ta tíð, sum er til taks at útinna arbeiðið, soleiðis, at tað verður arbeitt:

1) intensivt, millum annað við høgum títtleika ella uttan steðgir til hvíld, ella
2) nógvar tímar, sum kunnu ávirka møguleikan fyri hvíld.

**§ 15.** Tá ið mett verður um, hvørt stór arbeiðsbyrða og tíðartrýst kunnu seta trygd ella heilsu í vanda, skal dentur serliga leggjast á sambandið millum hesi viðurskifti:

1) Hvussu umfatandi stóra arbeiðsbyrðan og tíðartrýstið eru, herímillum hvussu langt tíðarbil, talan er um.
2) Hvat slag av stórari arbeiðsbyrðu og tíðartrýsti, talan er um.
3) Fyribyrgjandi tiltøk, herímillum tey tiltøk, sum eru nevnd í skjali 1.

*Stk. 2.* Í sambandi við metingina eftir stk. 1 skal dentur harumframt leggjast á, um aðrar ávirkanir í arbeiðsumhvørvinum seta trygd ella heilsu í størri vanda.

*Ógreið krøv og mótstríðandi krøv í arbeiðinum*

**§ 16.** Arbeiðið skal í øllum liðum verða lagt til rættis, skipað og útint soleiðis, at tað er trygdarliga og heilsuliga fult forsvarligt, bæði yvir styttri og longri tíð, við atliti at ógreiðum og mótstríðandi krøvum.

**§ 17.** Ógreið og mótstríðandi krøv í arbeiðinum eru, tá ið krøv eru í arbeiðinum, sum ikki eru týðilig, ella sum eru ósamsvarandi, millum annað krøv til arbeiðsuppgávur, góðskustig, arbeiðsfunktión, ábyrgdarøki, arbeiðshættir, arbeiðsgongdir, leiklutabýti, tíðarnýtslu, arbeiðsferð ella arbeiðstíð.

**§ 18.** Tá ið mett verður um, hvørt ógreið og mótstríðandi krøv í arbeiðinum kunnu seta trygd ella heilsu í vanda, skal dentur serliga leggjast á sambandið millum hesi viðurskifti:

1) Hvussu umfatandi ógreiðu og mótstríðandi krøvini í arbeiðinum eru, herímillum hvussu langt tíðarbil, talan er um.
2) Hvat slag av ógreiðum og mótstríðandi krøvum, talan er um.
3) Fyribyrgjandi tiltøk, herímillum tey tiltøk, sum eru nevnd í skjali 1.

*Stk. 2.* Í sambandi við metingina eftir stk. 1 skal dentur harumframt leggjast á, um aðrar ávirkanir í arbeiðsumhvørvinum seta trygd ella heilsu í størri vanda.

*Høg kenslulig krøv, tá ið arbeitt verður við menniskjum*

**§ 19.** Arbeiðið skal í øllum liðum verða lagt til rættis, skipað og útint soleiðis, at tað er trygdarliga og heilsuliga fult forsvarligt, bæði yvir styttri og longri tíð, við atliti at høgum kensluligum krøvum, tá ið arbeitt verður við menniskjum.

**§ 20.** Høg kenslulig krøv, tá ið arbeitt verður við menniskjum, er, tá ið arbeiðið fevnir um beinleiðis ella óbeinleiðis samband við menniskju, og har sambandið setur høg krøv til at:

1) Seta seg inn í, rúma ella handfara tankar, kenslur ella atferð hjá hesum menniskjum.
2) Handfara ella fjala egnar tankar ella kenslur.
3) Laga samskifti ella atferð til tey menniskju, sum arbeitt verður við.

**§ 21.** Tá ið mett verður um, hvørt høg kenslulig krøv í sambandi við arbeiði við menniskjum kunnu seta trygd ella heilsu í vanda, skal dentur serliga leggjast á sambandið millum hesi viðurskifti:

1) Hvussu umfatandi sambandið er við tey menniskju, sum arbeitt verður við, herímillum hvussu langt tíðarbil, talan er um.
2) Hvat slag av sambandi við menniskju, talan er um.
3) Fyribyrgjandi tiltøk, herímillum tey tiltøk, sum eru nevnd í skjali 1.

*Stk. 2.* Í sambandi við metingina eftir stk. 1 skal dentur harumframt leggjast á, um aðrar ávirkanir í arbeiðsumhvørvinum seta trygd ella heilsu í størri vanda.

*Niðrandi atburður, herímillum happing og kynsligur ágangur*

**§ 22.** Arbeiðið skal í øllum liðum verða lagt til rættis, skipað og útint soleiðis, at tað er trygdarliga og heilsuliga fult forsvarligt, bæði yvir styttri og longri tíð, við atliti at niðrandi atburði.

**§ 23.** Niðrandi atburður sambært hesi kunngerð er, tá ið ein ella fleiri persónar á einum arbeiðsplássi útseta ein ella fleiri aðrar persónar á arbeiðsplássinum fyri happing, kynsligan ágang ella afturvendandi, niðurgerandi atferð. Fyri at atburðurin kann metast sum niðrandi sambært hesi kunngerð, skal hann verða fataður sum niðrandi av tí ella teimum útsettu persónunum.

*Stk. 2.* Vanlig útinnan av leiðslu, afturboðan millum starvsfelagar og líknandi eru ikki í sær sjálvum niðrandi atburður.

**§ 24.** Tá ið mett verður um, hvørt niðrandi atburður kann seta trygd ella heilsu í vanda, skal dentur serliga leggjast á hesi viðurskifti:

1) Vavið av tí niðrandi atburðinum, herímillum tíðarskeiðið, atburðurin fevnir um.
2) Slagið av tí niðrandi atburðinum, herímillum tann samanhangin, sum hann er í.
3) Fyribyrgjandi tiltøk, herímillum tey tiltøk, sum eru nevnd í skjali 1.

*Stk. 2.* Í sambandi við metingina eftir stk. 1 skal dentur harumframt leggjast á, um aðrar ávirkanir í arbeiðsumhvørvinum seta trygd ella heilsu í størri vanda.

*Arbeiðstongdur harðskapur*

**§ 25.** Arbeiðið skal í øllum liðum verða lagt til rættis, skipað og útint soleiðis, at tað er trygdarliga og heilsuliga fult forsvarligt, bæði yvir styttri og longri tíð, við atliti at vandanum fyri arbeiðstongdum harðskapi. Arbeiðstongdur harðskapur er sambært hesi kunngerð, tá ið persónur, sum ikki er starvsfólk ella arbeiðsgevari, fremur harðskap móti starvsfólki ella arbeiðsgevara í sambandi við arbeiðið, ið verður útint.

**§ 26.** Harðskapur er:

1) likamligur harðskapur, ið fevnir um álop móti likami, sambært reglunum í kapitli 25 í revsilógini, og
2) sálarligur harðskapur, ið fevnir um hóttanir og annan niðrandi atburð.

*Stk. 2.* Arbeiðstongdur harðskapur, kann bæði fara fram í og uttan fyri arbeiðstíð.

**§ 27.** Tá ið mett verður um vandan at verða fyri arbeiðstongdum harðskapi, skal dentur serliga leggjast á hesi viðurskifti:

1) Sannlíkindini fyri, at arbeiðstongdur harðskapur kann koma fyri í arbeiðinum.
2) Slagið av tí harðskapi, sum kann koma fyri.
3) Fyribyrgjandi tiltøk, herímillum tey tiltøk, sum eru nevnd í skjali 1.

*Stk. 2.* Í sambandi við metingina eftir stk. 1 skal dentur harumframt leggjast á, um aðrar ávirkanir í arbeiðsumhvørvinum seta trygd ella heilsu í størri vanda.

**§ 28.** Um vandi er fyri arbeiðstongdum harðskapi, skal arbeiðsplássið verða innrættað soleiðis, at starvsfólk kunnu sleppa sær úr vandanum. Um tað við arbeiði, sum er umfatað av kunngerð um innrætting av skiftandi arbeiðsplássum, ikki er møguligt ella rímiligt at broyta innrættingina av arbeiðsstaðnum, skulu onnur tiltøk setast í verk, sum tryggja, at starvsfólk kunnu sleppa sær úr vanda.

**§ 29.** Um starvsfólkið arbeiðir einsamalt, og hetta kann hava við sær ein serligan vanda fyri harðskap í arbeiðinum fyri viðkomandi, skal arbeiðið verða lagt til rættis soleiðis, at tann serligi vandin fyri harðskapi verður fyribyrgdur. Um serligi vandin fyri harðskapi ikki kann fyribyrgjast, skal starvsfólkið ikki arbeiða einsamalt.

**§ 30.** Arbeiðsgevarin skal tryggja, at einans starvsfólk, sum hava fingið hóskandi vegleiðing, hava atgongd til øki, har tað er ein serligur vandi fyri harðskapi í arbeiðinum.

*Arbeiðstongdur harðskapur uttan fyri arbeiðstíð*

**§ 31.** Arbeiðið skal í øllum liðum verða lagt til rættis, skipað og útint soleiðis, at tað er trygdarliga og heilsuliga fult forsvarligt, bæði yvir styttri og longri tíð, við atliti at vanda fyri arbeiðstongdum harðskapi uttan fyri arbeiðstíð.

**§ 32.** Tá ið mett verður um vandan at verða fyri arbeiðstongdum harðskapi uttan fyri arbeiðstíð, skal serligur dentur leggjast á hesi viðurskifti:

1) Sannlíkindini fyri, at arbeiðstongdur harðskapur kann koma fyri uttan fyri arbeiðstíð.
2) Slagið av tí harðskapi, sum kann koma fyri.
3) Fyribyrgjandi tiltøk, sum eru sett í verk á arbeiðsplássinum, millum annað tey tiltøk, sum eru nevnd í skjali 1.

*Stk. 2.* Í sambandi við metingina eftir stk. 1 skal dentur harumframt leggjast á, um aðrar ávirkanir í arbeiðsumhvørvinum seta trygd ella heilsu í størri vanda.

**§ 33.** Arbeiðsgevarin skal tryggja, at starvsfólkini verða vegleidd í hóskandi handfaring av arbeiðstongdum tilburðum av harðskapi uttan fyri arbeiðstíð.

*Stk. 2.* Arbeiðsgevarin skal tryggja, at tað verða ásettar leiðreglur fyri hóskandi handfaring av arbeiðstongdum tilburðum av harðskapi uttan fyri arbeiðstíð.

**§ 34.** Arbeiðsgevarin skal tryggja, at eitt starvsfólk, sum hevur verið útsett fyri einum arbeiðstongdum tilburði av harðskapi uttan fyri arbeiðstíð, verður bjóðað hjálp at fráboða tilburðin til løgregluna.

*Stk. 2.* Skyldan í stk. 1 er treytað av, at arbeiðsgevarin hevur fingið kunnleika til tilburðin.

## Kapittul 4
## Kæra, revsing og gildiskoma

*Kæra*

**§ 35.** Avgerðir hjá Arbeiðs- og brunaeftirlitinum sambært hesi kunngerð kunnu kærast sambært § 63 í løgtingslógini.

*Revsing*

**§ 36.** Um ikki hægri revsing er heimilað sambært aðrari lóggávu, verður við bót tann revsaður, ið:

1) Fremur brot á §§ 5, 8-13, 16, 19, 22, 26, 28-31 og 33.
2) Ikki ger eftir boðum, givin sambært ásetingunum í kunngerðini.

*Stk. 2.* Fyri brot á §§ 5, 11-13, 16, 19, 26, 28-31 og 33, kann arbeiðsgevarin verða sektaður við bót, sjálvt um brotið ikki kann roknast gjørt við vilja ella ósketni.

*Stk. 3.* Fyri brot, sum verða framd av løgfrøðiligum persóni, sum t.d. partafelagi ella lutafelagi, kann tann løgfrøðiligi persónurin verða sektaður sum slíkur. Er brotið framt av landinum, einari kommunu ella kommunalum felagsskapi, kann landið, kommunan ella kommunali felagsskapurin verða sektað.

*Gildiskoma*

**§ 37.** Kunngerðin kemur í gildi 1. august 2025.

Umhvørvismálaráðið, 11. juni 2025

**Margit Stórá (sign.)**
landsstýriskvinna

/ Pól E. Egholm (sign.)

**Skjal 1**

## Fyribyrgjandi tiltøk og almennar meginreglur um fyribyrging

*Fyribyrgjandi tiltøk*

Dømi um fyribyrgjandi tiltøk, sum kunnu verða við at tryggja, at ávirkanirnar í sálarliga arbeiðsumhvørvinum eru trygdarliga og heilsuliga forsvarligar:

1) Fullgóð skipan av arbeiðinum.
2) Nøktandi og hóskandi upplæring og vegleiðing í útinnan av arbeiðinum.
3) Virkið eftirlit við útinnan av arbeiðinum.
4) Regluligar váðametingar av arbeiðsumhvørvinum.
5) Fullgóð innrætting av arbeiðsstaðnum.
6) Røtt nýtsla av tøkniligum hjálpartólum, sum skulu vera hóskandi ella tillagað til arbeiðið.
7) Møguleiki fyri stuðli í arbeiðinum, herundir stuðul frá leiðslu og starvsfelagum.
8) Møguleiki fyri ávirkan í arbeiðinum við atliti at tí arbeiði, sum skal útinnast.

*Almennar meginreglur um fyribyrging*

Fyribyrgjandi tiltøk skulu setast í verk við atliti at teimum almennu meginreglunum um fyribyrging. Tær almennu meginreglurnar um fyribyrging eru:

1) Fyribyrging av vandum.
2) Meting av vandum, sum ikki kunnu fyribyrgjast.
3) Tillaging av arbeiðinum til starvsfólkið, serliga viðvíkjandi skipan av arbeiðsplássinum og val av arbeiðsútgerð og arbeiðshættum og framleiðsluhættum, serliga við tí endamáli at avmarka einsháttað arbeiði og arbeiði í ávísari rútmu og at minka um ávirkanina av slíkum arbeiði á heilsuna.
4) Atlit til tøkniliga menning.
5) Útskifting av tí, sum er vandamikið, við nakað, sum er vandaleyst ella minni vandamikið.
6) At leggja fyribyrgingina til rættis soleiðis, at hon verður ein samanhangandi heild, ið fevnir um tøkni, arbeiðstilrættislegging, arbeiðsumstøður, sosial sambond og ávirkan frá viðurskiftum í arbeiðsumhvørvinum.
7) Íverksetan av tiltøkum til felags verju fram um tiltøk til einstaklingaverju.
8) Hóskandi vegleiðing til arbeiðstakararnar.